# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ferðslutrygdin í hásæti

" - Eingin skal doyggja ella verða álvarsliga skaddur í ferðsluni!"

So bærilig er 0-hugsjónin, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd setti sær fyri nørkum árum síðani, og sum løgtingið seinni samtykti at verða grundarlagið undir ferðslupolitikkinum í Føroyum.

Ferðslan er største hóttanin móti mannaheilsuni, tí er tað so nátúrligt, at landsins myndugleikar – og hvør einstakur okkara, taka hetta í fullum álvara. Hetta er okkara ábyrgd. Tað er eisini okkara ábyrgd, at børn okkara verða uppald til at vanda sær væl í ferðsluni og ikki koma sær sjálvum og øðrum í vanda.

Í blaðnum í dag hava vit nøkur dømi, har skúlabørn verða sett í stóran vanda, tí tey verða noydd at ferðast til gongu gjøgnum sera vandamikla ferðslu. Venda vit aftur til 0-hugsjónina, so er júst eitt av málunum har, at vit gera ferðsluleiðirnar so tryggar, sum til ber. Og hvør er meira útsettur, enn okkara smæstu medborgarar?

Taka vit málið á Velbastað, so átti tað ikki at tikið so langa tíð at funnið út av, hvussu velbastaðbørn trygt kunnu ganga úr bygdini og niðan í Frítíðarskúlan. Talan er um gamla landsvegin til Velbastaðar, sum nú er omankoyring frá nýggja landsvegnum til bygdina. Hví kann man ikki seta ferðamarkið niður, gera bungur ella lummar, sum noyða bilførar at minka ferðina? Hví ikki gera, sum Tórshavnar kommuna hevur gjørt uttan fyri SMS? Um einki slíkt kann gerast, hví so ikki gera børnunum eina nýggja farleið, sum ikki er á landsvegnum? Hetta eru viðurskifti, sum Tórshavnar kommuna og Landsverk eiga at kunna greiða uttan tað stóra hóvastákið – og uttan at foreldrini á Velbastað mugu bíða, til tann álvarsama vanlukkan er hend – tann, sum ikki skal henda sambært 0-hugsjónini.

Taka vit so málið um Ferðslutrygdina hjá hvítanesbørnum, so eigur tað málið eisini at kunna loysast. Nú skilst, at broyting verður hjá bussleiðini, so børnini sleppa til og frá skúla uttan vanda. Men aftur her kunnu vit seta spurningin, hví eingin trygg gongufarleið er av Hvítanesi oman á Vegin Langa? Fyri kortum stongdi Landsverk Kalbaksvegin í fleiri dagar, tín ein seyðasmoga skuldi gerast undir landsvegin eitt sindur norðran fyri Hvítanes. Hví verða slíkar smogur ikki gjørdar til gongufólk undir landsvegin, so ein trygg farleið hjá fólki til gongu er oman til Hoyvíkar?

Hví lands- og býarmyndugleikar ikki loysa slík smámál uttan fjant og fjas og undanførslur er ilt hjá vanliga borgarnum at skilja...

**Sosialurin**

## Vóni ikki, at sosialistiska trioin innir sítt verk

JÓGVAN VIÐ KELDU
keldu@post.olivant.fo



**Latið partafelagið, sum nú kveikti Skálafjarðarverkætlanina, og í mong ár hevur arbeitt við henni, útinna arbeiði, sum hesir byrjaðu, so hetta ikki verður seinkað**

Tey eru ikki so fá, sum í dag spyrja bæði seg sjálvi og onnur: "Hvat hevði hent, um ikki ávíkavist kommunur og vinnulív í Vágum og kommunur og vinnulív í Klaksvík, høvdu skapað og strongt á, fyri at fáa framt ta nýhugsan at fáa undirsjóvartunlar framdar"?

Hetta kann fyribils svarast við einum spurningi: "Høvdu hesir yvirhøvur verið veruleiki ídag, um vit skuldu bíða eftir sentralistiskum landspolitikarum!"

Eg eri ræddur fyri, at einfalda svarið er, at tað høvdu teir ikki!

Sjálvandi fari eg ikki at minna á undirskrivtarinnsavningar í 1990unum og tær røðir av mótmælum við áhaldandi ágangi í føroysku fjølmiðlunum sum vóru og enntá mótmæli frá landspolitiska røðarapallinum.

**Gevið íverksetarum rúm**
Ídag verður "íverksetarafyribrigdi" ofta havt frammi av vinstravonginum, hvussu umráðandi tað er, at "vit" skapa íverksetarar, nú veit eg ikki, hvørjir hesir "vit" eru.

Sannleikin er tíverri, at um so er, at ein íverksetan gevur nógvan pening av sær, er umráðandi, at steðga hesum fíggjarligu sterku framherjum, tí teir kunnu skaða landið.

Vóni ikki, at sosialistiska trioin í hesum føri eirindarleyst innir sítt verk!

**Skálafjarðartunnilin**
Nú í mong ár hava búskapar- , verk- og samfelagsfrøðingar v.m. sitið og kanna møguleikar fyri einum tunli millum Eysturoynna og høvuðsstaðin.

Nú tað sær út til, at henda verkætlan er nøkulunda fíggjarliga og samfelagsliga burðardygg, fer sosialistiska trioin eftir hesum gloypubita, heldur enn at lata hesar íverksetarar útinna hesa væltilrættaløgdu verkætlan.

Tosað hevur verið um, at "vit føringar skulu verða millum fremstu tjóðir 2015", "vit føringar skulu hava heimsins besta skúla um fá ár", "Føroyar á heimskortið" o.s.fr.

Eingin ivi er í, at tað eru nøkur, sum í ávísan mun eru før fyri at seta Føroyar, um ikki sum ein graverandi part, á heimskortið, so at gera dyggiliga vart við okkum, eitt nú Guðrun & Guðrun, Formula Føroyar, Teitur, Eivør og onnur.

Men tað eigur at gerast púra greitt, at fer sosialistiska trioin at inna sítt verk, sum hesir nú ætla, og hetta er bert eitt dømi, verða ambisiøsu ætlanirnar bert dreymar.

**Gevið framfýsni rúm**
Vegurin at vinna landinum fram er at lata tey, sum hava evni, árræði og visiónir sam-feldar við góðari útbúgving sleppa at virka ótarnað, uttan at øvundin fær rúm og at onkur fær nakað burturúr, steðgar framfýsni hjá okkara evnaríku samfelagsborgarum.

Við Vágatunlinum og Norðoyatunlinum í minni, fara vit mongu at heita á okkara landspolitikarar bæði í samgongu og í andstøðu: "Latið partafelagið, sum nú kveikti verkætlanina og í mong ár hevur arbeitt við henni, útinna arbeiðið, sum hesir eru byrjaðir, so hetta arbeiðið ikki verið seinkað"!

## Kári spyr Karsten um TAKS

KÁRI P. HØJGAARD



**Kári P. Højgaard hevur sent skrivligan fyrispurning til Karsten Hansen um ætlaðu flytingina av Toll- og Skattstovuni – ella TAKS – og Eysturoyar- og Norðoya økinum**

Verða ætlaðu bygnaðarbroytingarnar á Toll- og Skattstovu Føroya framdar, so deildirnar í Saltangará og Klaksvík verða niðurlagdar og nýggj deild opnar í Gøtudali ?

Hevur Karsten Hansen somu áskoðan um fyrimunir og vansar við at niðurleggja tvær vælvirkandi høvuðsdeildir hjá Toll- og Skatt og flyta hesar út um fjølbygt øki ?

Kann hugsast at landsstýrismaðurin í staðin tekur stig til at hesar báðar deildirnar halda fram, har tær eru í dag, og í staðin verða mentar og styrktar, so tær framhaldandi kunnu veita eina góða tænastu so nær borgarunum sum gjørligt.

Er nakað í nýggjastu tíðindunum, ið eru farin at ganga sum rótasúpan, at deildin hjá T&S í Saltangará ikki flytur í Gøtudal, men skal flytast heilt til Klaksvíkar.

Í viðmerkingunum vísir Kári P. Højgaard á, at nógv órógv stóðst av ætlanini hjá undanfarnu samgongu at gera umfatandi bygnaðarbroytingar á Toll- og Skatt í Norðurøkinum.

- Síðan Norðurøki bleiv samanlagt 1. November 2005 er onki hent. Arbeitt verður undir sera trongum hølisviðurskiftum í Saltangará við 21 starvsfólkum á deildini. Í Klaksvík eru 15 starvsfólk, íroknað ein persón á kolvetnisskattadeildini.

- Deildirnar í Klaksvík og Saltangará liggja í næst og triðstørsta býi í Føroyum. Her er fólkatættleikin størstur við nógvum virksemi á havnaløgunum, altjóða skipaferðslu og tollavgreiðslu, skrivar tingmaðurin.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.